

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 01 - 2012

# Avaldsnes kanska ikki so stórt sum hildið

Lundin Petroleum, sum er operatørur á Avaldsnesfundinum kunngjørdi í morgun, at úrslitið av teirri seinastu boringini hjá felagnum í økinum svaraði ikki til tað, sum roknað varð við, og at Avaldsnesfundið tí helst má skerjast eitt sindur. Avaldsnes er annar parturin av tí seinasta risastóra fundinum í norska partinum av Norðsjónum. Hin parturin er Aldous Major, sum Statoil fann, og roknað varð við, at 3,3 milliardir tunnur av olju vóru í økjunum. Hevði hendan metingin hildið, var talan um tað triðstørsta fundið í norskum sjógvi nakrantíð. Lundin sigur í fráboðanini, at tað ber ikki til at siga endaliga, hvussu nógv skal skarvast av teirri upprunaligu metingini, tí tað er neyðugt at gera fleiri kanningar fyrst. Brunnurin, sum felagið hevur borað, er tann fyrsti av fleiri. Dýpið har er góðar 100 metrar, og borað varð 2.042 metrar niður. Talsmaðurin hjá felagnum, Ola Anders Skauby, ásannar fyri Aftenbladet, at úrslitið var eitt vónbrot, men hann leggur tó afturat, at tað hevur alla tíðina verið ivi um ta upprunaligu metingina. Ætlan er at bora tveir brunnar á Aldous og fýra á Avaldsnes í ár, og úrslitini av hesum boringunum kunnu broyta metingina av økinum eina ferð afturat - og báðar vegir. Tann upprunaliga meringin fyri Aldous/Avaldsnes var, at har eru millum 1,7 og 3,3 milliardir tunnur av olju.